# Ársfrágreiðing

# 2013

# um

# seyðahaldið í Heygshaga

**Hans Martin Andreassen**



Træveturveðrur hjá Óla í Hjøllum, sum var kosin vakrasti eldri veðrur í 2013

# Ársfrágreiðing 2013 um seyðahaldið í Heygshaga.

Árið byrjaði við at taka veðragjólingarnar inn, og varð hetta gjørt tann 9. januar. Fingu allar aftur.

## Stráfóður

Tað var lítið av  kava  síðsta vetur, og tí varð ikki hildið, at neyðugt var at geva stráfóður. Gjólingarnir vórðu tiknir inn, tá ið vit høvdu skannað ærnar. Teir vóru inni í 3 vikur, og hesa tíðina fingu teir súrhoyggj og kraftfóður. Hetta var gjørt fyri at venja teir við fóður.

## Kraftfóður

Allur seyðurin í haganum fekk kraftfóður. Byrjaðu at geva 13. mars.

## Sunnasta Gonga og Miðjan:

Frá 13. mars vóru tær sunnastu inni á bønum niðanfyri støðina. Tær í miðjuni vóru á bønum frammanfyri støðina. Góvu  uml. 300 g pr. seyð hvønn dag til 26. mars.

Vóru á fjalli tann 25. mars. Tá ið fjallið var liðugt, vóru tvílemburnar sleptar oman um landsvegin, og einlemburnar vórðu verandi á bønum. Tvílemburnar fingu 600 g pr. seyð um dagin frá 26. mars til 16. apríl. Frá 16. apríl til 16. mai fingu tær 870 g pr. seyð um dagin.

Einlemburnar fingu 370 g pr. seyð um dagin frá 26. mars til 16. apríl. Frá 16. apríl til 16. mai fingu tær 500 g pr. seyð um dagin.

Góvust at geva tann 16. mai og róku seyðin av bønum sama dag.

# Ennisgongan:

**Ennisgongan er í tveimum fylgjum, ið nevnast Svartá og Hvilvt**

Byrjaðu at geva tann 13. mars. Frá 13. mars til 26. mars fingu tær 280 g pr. seyð um dagin. Frá 26. mars til 16. apríl 370 g pr. seyð um dagin. Frá 16. apríl til 22. mai fingu tær 500 g pr. seyð um dagin.

# Fjalldagar:



**Fyrsti fjalldagur:** Tann 14. februar róku vit allan seyðin fyri at skanna um kvið, viga og skráseta vektina. Skanningin vísti 42 tvílembur, 130 einlembur og 5 vóru geldar, harav 2 vóru gjólingar.

Manning: Mourits Sørensen, Jónleyg Danielsen, Ólavur av Steinum og Hans Martin Andreassen. Raksturin gekk væl.

**Annar fjalldagur:** Tann 25. mars róku vit tær sunnastu og Miðjuna inn á støðina. Allur seyðurin varð viðgjørdur við Coromectin fyri ótoy og orm og

covexin fyri lambablóðsótt, eisini koyrdu vit Crovect eftir rygginum fyri lús. Allur seyðurin varð eisini vigaður og skrásettur.

Manning: Ólavur av Steinum, Mourits Sørensen, Maja Skaale Olsen, Andrass Holm Arge og Hans Martin Andreassen

**Triði fjalldagur:** Tann 27. mars róku vit Svartá og Hvilvt oman á støðina. Viðgjørdu seyðin við Coromectin fyri ótoy og orm, Covexin fyri lambablóðsótt. Eisini koyrdu vit Crovect eftir rygginum fyri lús. Allur seyðurin varð vigaður og skrásettur.

Manning: Hans Martin Andreassen, Ólavur av Steinum, Mourits Sørensen, Andrass Holm Arge, Maja Skaale Olsen og Dorthea Joensen.

22 tvílembur vórðu koyrdar oman um landsvegin. 12 tvílembur vórðu koyrdar í hundahegnið, og 6 vóru sleptar út á bøin saman við einlembunum.

# Lembingin:

Lembingin byrjaði tann 21. apríl. Eftir tíðini passaði hetta rættiliga væl. Veðrið í lembingini var ikki av tí allar besta. Tað vóru nakrir dagar við sera vánaligum veðri, og mistu vit nøkur lomb orsaka av veðri. Tvær ær fingu mjólkafepur, men báðar komu fyri seg, aftaná at tær vóru sproytaðar fyri mjólkafepur. Ein afturvendandi trupulleiki er, at ærnar fara heilt oman á bøin Niðri á Heyggi. Hetta ger tað sera ringt at fáa klipsað og vigað øll lombini í lembingini.

**Fjórði fjalldagur:** Tann 3. juli varð farið í royting. Róku allan hagan henda dagin.

Allar ærnar á Hvilvt og við Svartá vóru vigaðar og royttar, og lombini vigaði og markaði.

Allur seyðurin fekk heilivág, Endospec fyri orm og iglar.

Manning: Jens Ivan í Gerðinum, Bartal Andreassen, Dánjal Petur Müller, Zakarias Jakobsen, Ari Jóhannesson, Jóhannes Andrasson Arge, Ólavur av Steinum, Mourits Sørensen, Maja Skaale Olsen, Andrass Holm Arge, Hjørdis H. Jensen og Hans Martin Andreassen.

**Fimti fjalldagur:** 4. juli. Royttu og vigaðu allar ærnar úr Sunnasta gongu og Miðjuni. Lombini vóru markað og vigað. 120 lomb vóru við í einari roynd, har

kannað verður, um tað hevur nakra ávirkan á flettu vektina, um lombini verða roytt. Helvtin av hesum 120 lombum varð roytt, meðan hin helvtin varð óroytt og nýtt til sammetingar.

Allur seyðurin fekk heilivág, Endospec fyri orm og iglar.

Manning: Mourits Sørensen, Ólavur av Steinum, Andrass Holm Arge, Dánjal Petur Müller, Zakarias Jakobsen, Bartal Andreassen, Jóhannes Andrasson Arge og Hans Martin Andreassen.

**Sætti fjalldagur:** Tann 24. september vóru vit í skurð. Róku allan hagan. Vit vóru lidnir kl. 23:45. Allur seyðurin var vigaður. Avdeyðaærnar vóru tiknar, og veðragjólingar og sleppingarlomb slept upp. Lombini, sum skuldu flettast, vóru tikin burturúr. Áseyðurin varð viðgjørdur við Combinex fyri orm.

Manning: Ólavur av Steinum, Zakarias Jakobsen, Bartal Andreassen, Dánjal Petur Müller, Jóhannes Andrasson Arge, Andrass Holm Arge, Helgi Skorá, Heri Müller og Hans Martin Andreassen. Jóannes Debess var við í samgongu.

**Sjeyndi fjalldagur:** Tann 6. november róku vit Sunnastu og Miðjuna fyri at velja ær út til eina roynd, har vit kanna, hvussu geving áðrenn brundtíð ávirkar lambatal. Dagin eftir vigaðu og bólkaðu vit ærnar. 32 ær blivu býttar í fýra bólkar við 8 í hvørjum. Ein bólkur var verandi inni til 6. januar. Ærnar í hesum bólkinum fingu súrhoyggj og seyðafóður. Ein bólkur fór í hagan og fekk einki fóður, meðan tveir fóru út á bøin. Hesir bólkarnir blivu rættaðir hvønn dag, og ærnar í øðrum bólkinum fingu kraftfóður til 6. januar, hinar fingu ikki kraftfóður.

Manning: Hans Martin Andreassen, Ólavur av Steinum, Andrass Holm Arge, Jóna Jacobsen, Maria M. Olsen, Hjørdis H. Jensen og Rólvur Djurhuus.



# Ærsvektir í Sunnastu:

Í skanning tann 14. februar var miðalvektin 44,50 kg

Í medisinfjalli tann 25. mars var miðalvektin 46,70 kg

Á várfjalli (áseyðaroyting) tann 4. juli var miðalvektin 43,70 kg

Í skurð tann 24. september var miðalvektin av øllum óm 55,00 kg

Flett vekt á ónum var 42,60 pund.

Flett vekt í % av livandi vekt var 38,05

# Ærsvektir í Miðjuni:

Í skanning tann 14. februar var miðalvektin 43,30 kg

Í medisinfjalli tann 25. mars var miðalvektin 46,60 kg

Á várfjalli (áseyðaroyting) tann 4. juli var miðalvektin 42,00 kg

Í skurð tann 24. september var miðalvektin av øllum óm 53,90 kg

Flett vekt á ónum var 45,80 pund.

Flett vekt í % av livandi vekt var 39,31

## Ærsvektir við Svartá:

Í skanning tann 14. februar var miðalvektin 46,90 kg

Í medisinfjalli tann 25. mars var miðalvektin 47,00 kg

Á várfjalli (áseyðaroyting) tann 3. juli var miðalvektin 43,30 kg

Í skurð tann 24. sept. var miðalvektin av øllum óm 54,50 kg

Flett vekt á ónum var 41,20 pund

Flett vekt í % av livandi vekt var 37,96

## Ærsvektir á Hvilvt:

Í skanning tann 14. februar var miðalvektin 43,30 kg

Í medisinfjalli tann 25. mars var miðalvektin 44,00 kg

Á várfjalli (áseyðaroyting) tann 3. juli var miðalvektin 43,60 kg

Í skurð tann 24. sept. var miðalvektin av øllum óm 54,30 kg

Flett vekt á ónum var 36,50 pund.

Flett vekt í % av livandi vekt var 34,8.



## Lambsvektir í  Sunnastu:

Nýlembd vigaðu lombini í miðal 3,729 kg

Á várfjalli tann 4. juli var miðalvektin 20,10 kg

Í skurð tann 24. sept. var miðalvektin 38,30 kg

Flett vekt var 30,16 pund í miðal

Flett vekt í % av livandi vekt var 38,1.

## Lambsvektir í Miðjuni:

Nýlembd vigaðu lombini í miðal 3,880 kg

Í royting var miðalvektin 20,10 kg

Í skurð var miðalvektin 39,80 kg.

Flett vekt var 31 pund.

Flett vekt í % av livandi vekt 39,8.

## Lambsvektir við Svartá:

Nýlembd vigaðu lombini í miðal 3,538 kg.

Í royting var miðalvektin 19,80 kg.

Í skurð var miðalvektin 40,40 kg.

Flett vekt var 32,7 pund.

Flett vekt í % av livandi vekt 39,4.

## Lambsvektir á Hvilvt:

Nýlembd vigaðu lombini í miðal 3,494 kg.

Í royting var miðalvektin 18,30 kg.

Í skurð var miðalvektin 38,60 kg.

Flett vekt var 33 pund.

Flett vekt í % av livandi vekt 41,6.

## Roynd við lombum á bønum frá 19. september

Tann 24. sept. vigaðu vit 13 veðurlomb (samlað vekt 592,5 kg - miðal 45,58 kg).

Tey vórðu síðan slept oman um landsvegin og gingu har til tann 28. okt.

Tann 28. okt. vórðu hesi lomb vigað aftur, og høvdu tey tá eina vekt, ið sá soleiðis út. (samlað vekt 622 kg - miðal 47,85 kg). Hetta vísti, at hesi lombini vóru 29,5 kg tyngri, enn tá ið tey fóru út á bøin. Sama roynd var gjørd í 2012, men tá lætnaðu lombini 13 kg.

Sjey av hesum lombum vórðu uppgjørd til veðragjóling, og hini 6 vórðu flett.

Miðalvektin av teimum, ið flett vóru, var 29 pund. Flett vekt var 35,58% av livandi vekt.



# Tvílembulombini:

Øll tvílembulombini, ið vóru dripin, høvdu eina miðalvekt á 28,73 pund.

Tey, ið gingu saman við ónum, sum fingu meira fóður, høvdu eina miðalvekt á 29,30 pund.

Tey, ið gingu saman við hinum ónum, høvdu eina miðalvekt á 26,83 pund.

Munur 2,8 pund miðal. Tað vil siga 5,6 pund meira undan hvørjari ær.

# <u>Fletting:</u>

Vit flettu allan seyðin á Búnaðarstovuni. Manningin var: Bergur Lützen, Øssur Andreassen, Hallur Sørensen, Jóhannes Andrasson Arge, Bjarni Jørgensen, Bjarki Hansen, Dánjal Pauli í Búðini, Øyvind Lützen og Bárður Johannesen.

Frá Búnaðarstovuni var Hans Martin Andreassen.

Vit flettu 101 lamb tann 26. sept. og 32 lomb tann 27. sept. Hin 30. sept. vóru 40 ær flettar.

Seyðin, ið gekk niðanfyri vegin, flettu vit sjálvi.

# Veðragjólingar:

Sleptu veðragjólingunum út tann 27. nov. Í hagan fóru 2 veðrar og 4 veðragjólingar. Til ærnar, ið vóru inni, høvdu vit ein veðragjóling og ein til ærnar, ið gingu á bønum (roynd við geving). Aftaná 10 dagar skiftu vit teir báðar um.

# Bruttoúrtøka:

40 ær flettar, tilsamans 1.598,95 pund, sum gevur eina miðalvekt á 39,97 pund.

**Sunnasta gonga.** 46 lomb 1.387 pund gevur eina miðalvekt á 30,16 pund.

**Miðjan.** 43 lomb 1.333 pund gevur eina miðalvekt á 31,00 pund.

**Svartá.** 39 lomb 1.276 pund gevur eina miðalvekt á 32,72 pund.

**Hvilvt.** 8 lomb 264 pund gevur eina miðalvekt á 33,00 pund.

# Rakstrarútreiðslur 2013

| | |
|---|---|
| Fjallløn | 27.600,00 kr. |
| Fletting | 30.701,00 kr. |
| Fóður | 20.444,00 kr. |
| Skanning | 1.440,00 kr. |
| Heilivágur | 4.482,00 kr. |
| Elektronisk oyramerki | 3.500,00 kr. |
| Aðrar útreiðslur | 4.000,00 kr. |
| **Útreiðslur í alt** | **92.167,00 kr.** |